# Eysturoyggin føroysk

*Líkt er til, at tað bert eru eysturoyingar, sum hava álit á føroysku venjarunum*



*Johan Nielsen er ein av trimum føroyskum venjarum í fyrstu deild. Eins og Trygvi og Jóannes venur hann eisini eitt eysturoyarlið*

Bert trý feløg í 1.deild hava føroyskar venjarar í hesum kappingarárinum.

Áhugavert er, at øll hesi feløgini umboða Eysturoynna. (Johan Nielsen venur GÍ, Trygvi Mortensen NSÍ, og Jóannes Jakobsen B68).

Øll hini sjey liðini uttanfyri Eysturoynna hava fremmandar fótbóltsserfrøðingar at stýra spælinum. Tveir jugoslavar (Tomislav Sivic í KÍ og Milan Cimburovic í Sumba), 1 rumena (Ion Geolgau í HB), 1 svia (Pelle Andersson í B36), 1 dana (Per Langvad í B71), 1 pólverja (Krzystof Popczynski í VB) og 1 litava (Kestutis Latoza í FS Vágum).

Og um vit taka tey feløgini, ið hava síni bestu lið í 2.deild, so er støðan akkurat tann sama.

Eysturoyarfeløgini ÍF, LÍF og EB/Streymur brúka føroyingar sum venjarar, meðan hini (TB og Royn) hav útlendskar venjarar!

Fimm venjarar (Johan Nielsen, Trygvi Mortensen, Ion Geolgau, Krzystof Popczynski og Milan Cimburovic) halda fram við somu feløgunum, ið teir vandu í seinnu helvt í kappingini-99.

Tomislav Sivic hevur skift frá B36 til KÍ, Jóannes Jakobsen byrjaði við sínum nýggja liði eftir eitt ár burtur frá fótbólti, og tríggjir útlendingar (Kestutis Latoza, Per Olov Andersson og Per Langvad) royna seg í Føroyum á fyrsta sinni.

IE

# Kappingar í frælsum ítrótti 2000

*Tað eru heilar 19 kappingar í frælsum ítrótti í ár sambært kappingarskránni hjá Deildarsambandinum fyri Súkkling og Frælsan ítrótt*

Tríggjar kappingar hava longu verið, og niðanfyri framganga úrslitini av tí seinastu av hesum, Flaggdagsrenningin. Umframt nógvar einstakar kappingar í renning, kasti og frælsum ítrótti annars skipar Deildarsambandið fyri tveimum Grand Prix kappingum í ár.

**Grand Prix kappingin í renning**

Síðani 1998 hevur verið skipað fyri Grand Prix renning, ið kann samanberast við eina landskapping fyri rennarar. Kappingin er skipað bæði sum einstaklingakapping og liðkapping millum tey trý feløgini Bragdið, Roysnið og Treysti.

Tey bæði seinastu árini hava Flaggdagsrenningin og rennikappingar á øllum stevnunum talt við, men í ár ætlar Deildarsambandið at skipa kappingina øðrvísi. Kappingarnar, ið telja við í Grand Prix kappingini í ár, eru Flaggdagsrenningin, Føroya Bjór Renningin á Norðoyarstevna, Eystanstevna, ein kapping á Svangaskarði, Vestanstevna og Ólavsøkan.

Av hesum seks kappingunum telja fimm tey bestu úrslitini hjá hvørjum rennara við. T.v.s. at rennararnir eru meiri frítt stillaðir - teir eru við í kappingini, sjálvt um tað gongst teimum illa í einari kapping, ella teir missa eitt umfar t.d. vegna skaða.

Stigatalvan er tann sama, ið hevur verið nýtt hini árini: nr. 1 í hvørji kapping fær 40 stig, nr. 2 fær 34 stig, nr. 3 - 30 stig, nr. 4 - 26 stig, nr. 5 - 23, nr. 6 - 20, nr. 7 - 18 stig, nr. 8 - 16 stig, nr. 9 - 14 stig, nr. 10 - 12 stig, nr. 11 - 10 stig, nr. 12 - 9 stig o.s.v. nr. 20 fær 1 stig.

Vinnari tey bæði undanfarnu árini hevur verið Guttorm Sørensen úr Treystinum, meðan Bragdið hevur vunnið liðkappingina.

**Daewoo marathon**

Sum nakað nýtt fer Deildarsambandið eisini at skipa fyri einari Grand Prix kapping í heyst. Hetta verður gjørt fyri at savna tær nógvu einstøku kappingarnar, sum liggja um heystið, í eina eind. Hetta skuldi havt við sær, at tey, ið renna, framvegis hava nakað at venja til, tá FM í frælsum ítrótti og Grand Prix kappingin eru liðug um Ólavsøkuna.

Hendan seinna kappingin, ið verður nevnd Daewoo marathon, fevnir um fýra umfør, ið tilsaman eru eitt marathon til longdar, t.v.s. 42,195 km. Vinnarin av kappingini er tann, ið hevur runnið tann samlaða teinin uppá stýtst tíð. Fyri at vera við í kappingini er sostatt neyðugt at luttaka í øllum fýra umførum.

Tey fýra umførini eru rættuliga ymisk. Fyrsta umfarið er Daewoo-renningin í Klaksvík, ið er á eini harðari rutu. Næsta kappingin er hálvmarathon í Havn; hetta er samstundis FM í hálvmarathon. Triðja kappingin er Runt Agnið, ið verðu runnið á eini harðari 10,5 km langari rutu í Eysturoy. Seinasta umfarið verður væntandi á Kambsdali í oktober.

Sum tað sæst av kappingarskránni niðanfyri, hevur Deildarsambandið fyri Súkkling og Frælsum ítrótti borðreitt við nógvum ymiskum kappingum í ár, so her skuldi verið okkurt fyri øll tey, ið hava hug at royna seg innan frælsan ítrótt.

# FM í Boccia og svimjing

*Árligu føroyameistarakappingarnar hjá ÍSB vórðu hildnar fyri góðari viku síðani, og í sama sambandi vórðu ársins svimjarar avdúkaðir*

Fyri góðari viku síðani skipaði ÍSB fyri FM-kappingum í boccia og svimjing. Tilsamans vóru eini 40 luttakarar, og umframt hesi vóru eisini heilt fitt av áskoðarum komin at hyggja og fylgja við, hvussu leikur mundi fara.



*Ársins svimjari hjá monnum: Símun Petur Zachariasen*

Endaligu úrslitini í boccia kappingunum vóru hesi:

**Fyri rørslutarnað**
1. Jóannis Ziska
2. Jógvan Tellin
3. Marius Johansen

**Fyri menningartarnað**
1. Unn Mortensen
2. Elvin Weihe
3. Jonhard Haraldsen

Eftir svimjikappingina vóru ársins svimjarar eisini kosnir. Hjá kvinnunum fall valið á Duritu Strøm, meðan Símun Petur Zachariasen varð kosin til ársins svimjara á mannfólkasíðuni.

## 19 dystir uttan tap

*KÍ ósigurin móti NSÍ var hin fyrstia á heimavølli í meira enn tvey ár*

Áðrenn tapið ímóti NSÍ mánadagin høvdu klaksvíkingar spælt 19 landskappingardystir á heimavølli, uttan at nakað mótstøðulið megnaði at fara suðuraftur við øllum trimum stigum.

Seinasta ferðin, hetta hendi, var 21.september í 1997, tá GÍ í einum ógvuliga spennandi dysti vann 5-4!

Síðani tá hevði KÍ vunnið fjúrtan ferðir heima, og fimm dystir endaðu við javnleiki.

IE

## Flagdagsrenningin

*Árliga flagdagsrenningin varð hildin í góðum líkindum týsdagin*

Onkur av luttakarunum vildi kanska vera við, at tað var heldur kalt, tá flagdagsrenningin fyri ár 2000 varð hildin týsdagin.

Tó so, samlaða luttakaratalið kom nakað væl upp um tey tveyhundrað, so heilt galið mundi tað kortini ikki vera.

Kappast varð í fýra ymsum bólkum, og eru úrslitini fyri bólkarnar víst niðanfyri:

**Menn**

| | |
|---|---|
| 1. Bogi Lenvig | 23 min. 51 sek |
| 2. Guttorm Sørensen | 23,56 |
| 3. Albert Marni Joensen | 24,15 |

**Kvinnur**

| | |
|---|---|
| 1. Rigmor N. Joensen | 28, 06 |
| 2. Sunnuvá Bjarnastein | 29,00 |
| 3. Tordis Debes | 30,05 |

**Dreingir**

| | |
|---|---|
| 1. Rani Herup Olsen | 6,19 |
| 2. Tróndur Kragesten | 6,22 |
| 3.Dánjal Davidsen | 6,41 |

**Gentur**

| | |
|---|---|
| 1. Helga Djurhuus | 6,40 |
| 2. Maria í Skorini Jacobsen | 7,22 |
| 3. Kristina F. Joensen | 7,28 |

Flaggdagsrenningin er samstundis fyrsta umfar í Grand-Prix kappingini



# Kvinnulandsliðið fekk silvur

*Partur av føroyska kvinnulandsliðinum í flogbólti hevur um páskirnar verið í Danmark á venjingalegu saman við teimum leikarunum, sum dagliga leika í bestu deildini í Danmark*

Í hesum sambandi tók liðið eisini lut í stórari altjóða flogbóltskapping í Rødovre - Påskestævnet - har um 140 lið rá Danmark, Svøríki, Týskalandi og Hollandi luttóku. Landsliðið var við í sterkasta kvinnubólkinum.

Í innleiðandi umfarinum var føroyska liðið saman við danska Farum VK og týska liðnum Tus Berne.

**Komu væl frá byrjan**

Fyrsti dysturin var ímóti týska liðnum. Hetta vóru stórar og sterka kvinnur, men heldur seinar tá tær fluttu seg. Við góðum og tryggum leiki vann Føroyar 2-0, og var hetta ein góð byrjan upp á kappingina.

Næsti dysturin var ímóti Farum VK, og gjørdist hesin ein sannur gysari. Føroyar vunnu fyrsta, men taptu næsta settið og tí varð neyðugt við einum javnbrótara.

Hesin gjørdist eisini sera spennandi og liðini fylgdust alt settið, men tað eydnaðist Føroyum at vinna 16-14 og harvið dystin 2-1.

Føroyar høvdu nú leikt seg fram til at leika um eitt plássi í finalubólkinum, og var í hesum sambandi leiktur ein dystur ímóti Lyngby, sum okkara kvinnur vunnu 2-0.

**Í finalubólkin**

Finalubólkurin varð leiktur 2. páskadag. Liðið leikti tveir dystir og vann 2-0 á Gentofte, men tað var dysturin ímóti einum týskum liðið, sum gjørdi at Føroya ikki komu ovast á sigursskammilin.

Hesin dysturin gjørdist sera spennandi og javnur, har neyðugt var við einum javnbrótara, sum týska liðið vann 15-13 eftir at støðan hevði verið 13-13. Føroyar tapti sostatt dystin 2-1.

Samanlagt gjørdist føroyska kvinnulandsliði sostatt nr. 2 í kappingini,og verður hetta mett sum eitt gott úrslit.

**Til Malta**

Føroyska flogbóltslandsliðið er annars í fer við at fyrireika seg til EM-undankapping, sum verður á Malta seinast í mai. Føroyar eru her í bólki saman við Malta, Kypros og Íslandi. Liðið metir at kappingin í Danmark var við til at styrkja samanspælið eins og komið var fram á nakrar veikleikar, sum skulu venjast fram til kappingina á Malta.

Við á føroyska kvinnulandsliðnum vóru: Helen á Lakjuni, ÍF, Marjun Kalsø, Mjølnir, Tina Jacobsen, Mjølnir, Alvilda Ólavsdóttir, TV 55, Juanna S. Joensen, ASV, Gerda Nattestad, Dráttur, Gudrid Nolsøe, Fortuna Odense, Margit G. Joensen, Mjølnir, og Helga Nordendal, Dráttur. Venjari er Niclas Joensen.

Harumframt eru hesar við í bruttoliðnum: Tóra Mortensen, TB, Winnie Djurhuus, TB, Mariann Øster, Fleyr og Annika Joensen, TV 55, sum var stødd uttanlanda tá kappingin fór fram.



*Føroysku flogbóltskvinnurnar stóðu seg væl í altjóða kapping í Rødovre herfyri*

# Føroyameistarar í badminton

*Badmintonárið er nú av á hesum sinni, og niðanfyri eru myndir av vinnarunum av FM-kappingini fyri einstaklingar*




*Føroyameistari í einstaklingakappingini hjá kvinnum varð Ingun Hansen úr Stráluni*



*Hjá monnum varð tað Ragnar Rasmussen, sum at enda tryggjaði sær FM-heitið*

Vikuskiftið 15. og 16. apríl varð kappst um FM í badminton fyri einstaklingar. Sum kunnugt var mest óvæntaða úrslitið helst, at tað eydnaðist Ragnari Rasmussen at basa Erlandi Poulsen í kappingini hjá monnum.

Kappast varð annars í ein- og tvímansleiki, og vórðu úrslitini hesi:

**Einmansleikur, kvinnur**
1. Ingun Hansen, Strálan
2. Guðrun Jacobsen, HBF

**Einmansleikur, menn**
1. Ragnar Rasmussen, HBF
2. Erland Poulsen, HBF

**Tvímansleikur, kvinnur**
1. Annika Berg og Guðrun Jacobsen, HBF
2. Elsa Thorkildshøj og Guri Poulsen, HBF

**Tvímansleikur, menn**
1. Gunnar M. Gregoriussen og Heðin Joensen, HBF
2. Erland Poulsen og Regin Hammer, HBF

**Blandaður tvímansleikur**
1. Elin Jacobsen og Erland Poulsen, HBF

Elsa Thorkildshøj og Aksel Poulsen, HBF



*Hjá kvinnunum Annika og Guðrun (h.m.) tvímansleikin, meðan Guri og Elsa gjørdust nr. 2*



*Tvímansleikin hjá monnum vunnu Gunnar og Heðin, sum standa høgrumegin, á Regini og Erlandi*



*Blandaður tvímansleikur: Elsa og Aksel gjørdust nr. 2, meðan Erland og Elin vunnu kappingina*